


www.oljan.fo

**Jan Müller** 30 - 10 - 2012

# Siemens gevst við sólorku

Tann risastóra týska orkufyritøkan Siemens kunngjørdi herfyri, at hon ætlar sær at gevast við sínum virksemi innan sólorku. Tað merkir, at felagið gevst við allari menning og framleiðslu, og at hesin parturin av fyritøkuni verður seldur. Í einum tíðindaskrivi frá fyritøkuni stendur, at samráðingar eru longu farnar í gongd við ein áhugaðan keypara. Avgerðin at gevast við sólorkuni ber í sær, at innan varandi orku fer Siemens nú at leggja seg eftir vind- og vatnorku, sigur fyritøkan í tíðindaskrivinum. ?